Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting:	25. februar 2021
Mál nr.:	16/01419
Málsviðgjørt:	JN/HZH
Eftirkannað:	25. februar 2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul
(Eftirlit við lestrarvirkni, reglur um stuðul til skúlagjald til lestrarfyrireikandi altjóða gymnasiala miðnámsútbúgving uttanlands, norðuratlantsflokkur javnsettur við miðnám í Føroyum og hægri hámark fyri skúlagjald til útbúgving uttan fyri Norðurlond)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 165 frá 20. desember 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 3 verða sum stk. 3 og 4 sett:
"*Stk. 3.* Útbúgvingarstovnurin hevur eftirlit við, um tann lesandi er lestrarvirkin, og í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at tann lesandi er farin undir útbúgvingina, og hvørt hálvár eftir hetta, skal útbúgvingarstovnurin boða Studna frá, um tann lesandi er lestrarvirkin sambært stk. 1, 2. pkt.
Stk. 4. Studni kann krevja stuðul rindaðan aftur, um tann lesandi hevur givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella hevur tagt burtur týðandi upplýsingar ella ikki lýkur treytirnar fyri stuðli annars."

2. Aftan á § 6 a verður sett:

"**§ 6 b.** Landsstýrismaðurin ásetur reglur um, at Studni kann veita studning til skúlagjald fyri næming, sum tekur lestrarfyrireikandi altjóða gymnasiala miðnámsútbúgving uttanlands, eftir at hava lokið fyrsta árið av gymnasialum miðnámi í Føroyum.
Stk. 2. Studningur til skúlagjald fyri næmingin kann í mesta lagi verða veittur í 2 ár.

§ 6 c. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um, at næmingur, sum tekur lestrarfyrireikandi gymnasiala

miðnámsútbúgving, sum er skipað sum liður í norðurlendskum samstarvi, og sum partvís er staðsett uttan fyri Føroyar, verður javnsettur við næming, sum tekur miðnámsútbúgving í Føroyum.”

3. Í § 12, stk. 4 verður: ““løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v. fl., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 21. mai 2008”” broytt til: “løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.”

4. Í § 13, stk. 1, 3. pkt. og stk. 2 verður “kr. 80.000” broytt til: “kr. 100.000”.

5. Í § 21, stk. 2-4 verður: “Toll- og Skattstovu Føroya” broytt til: “TAKS”.

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2021.
Stk. 2. Tó kemur § 6 b, sum ásett í § 1, nr. 2, í gildi dagin eftir, at henda løgtingslóg er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskotið verður lagt fram fyri at broyta lestrarstuðulslógina, soleiðis at nágreinað verður, at útbúgvingarstovnurin hevur eftirlit við lestrarvirkni hjá lesandi. Skotið verður eisini upp, at ásett verður í sjálvari lógini, at Studni hevur heimild at krevja útgoldnan stuðul aftur í ávísum førum. Heimilað verður eisini landsstýrismanninum at áseta reglur um, at Studni kann rinda skúlagjaldsstudning fyri næming, sum tekur lestrarfyrireikandi altjóða miðnámsútbúgving uttanlands eftir at hava lokið fyrsta árið av útbúgvingini í Føroyum, og heimilað verður landsstýrismanninum at áseta reglur um stuðul til næmingar, sum taka lestrarfyrireikandi miðnámsútbúgving sum liður í norðurlendskum samstarvi. Eisini verður skotið upp at hækka stuðulin til skúlagjald fyri hægri lestur uttan fyri Norðurlond.

1.2. Galdandi lóggáva

Studni hevur víst á, at tørvur er á at nágreina, at útbúgvingarstovnurin hevur eftirlit við, um lesandi er lestrarvirkin. Ásetingin í galdandi lóggávu er ikki nóg greið, við tí úrsliti, at lesandi kann fáa studning í eitt langt tíðarskeið uttan at vera lestrarvirkin.

Ongin áseting er í lógini um skúlagjaldsstudning til næming á altjóða miðnámsútbúgving uttanlands. Skipanin hevði heimild í løgtingslóg um studentaskúlar v.m., men heimildin varð ikki tikin við í nýggju lógini um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012. Hóast hetta, hevur skipanin framhaldandi verið praktiserað, og skúlagjaldið goldið av játtanini til lestrarstuðul.

Í lógini er ongin áseting um at veita stuðul til føroyskar miðnámsskúlanæmingar, sum ganga í flokki, sum er skipaður sum liður í norðurlendskum samstarvi, har næmingarnir lutvís ganga í skúla í Føroyum. Hóast hesir næmingar ganga í skúla í Føroyum ávíst tíðarskeið, verða teir í verandi lóg ikki javnsettir við aðrar næmingar í Føroyum.

Viðvíkjandi skúlagjaldinum fyri hægri útbúgvingar uttan fyri Norðurlond verður skúlagjaldið hækkað, av tí at skúlagjaldið seinastu árini er munandi hækkað, serliga í Póllandi.

1.3 Endamálið við uppskotinum

- At áseta greiðari reglur fyri eftirlit við lestrarvirkni og heimild til Studna at krevja studning afturgoldnan í ávísum førum

- At fáa til vegar heimild at veita skúlagjaldsstudning til føroyskar næmingar, sum taka 2 ár av gymnasialari miðnámsútbúgving á altjóða gymnasialari útbúgving uttanlands

- At fáa til vegar heimild at javnseta føroyskar næmingar, sum taka miðnámsútbúgving sum liður í norðurlendskum samstarvi, og sum lutvíst er staðsett í Føroyum, við aðrar miðnámsskúlanæmingar í Føroyum

- At broyta hámarkið fyri skúlagjald í sambandi við hægri lestur uttan fyri Norðurlond

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Nýskipanin, sum uppskotið hevur við sær, er:

- Greiðari reglur um eftirlit við lestrarvirkni
- Skúlagjaldsstudningur til føroyskar næmingar, sum taka altjóða gymnasiala miðnámsútbúgving uttanlands
- Stuðul til føroyskar næmingar, sum taka gymnasiala miðnámsútbúgving sum liður í norðurlendskum samstarvi
- Broyting av hámarki fyri skúlagjald í sambandi við hægri lestur uttan fyri Norðurlond

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Løgtingslógaruppskotið hevur verið til hoyringar á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Harumframt hevur løgtingslógaruppskotið verið til ummælis hjá aðalráðunum, Fróðskaparsetri Føroya, Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS), Studna, Undirvísingarstýrinum, Vegleiðarastovuni, Vegleiðarafelagnum, vinnu- og miðnámsskúlunum, Vinnuhúsinum, UWC Føroyar og næmingaráðunum á útbúgvingarstovnunum.

Almannamálaráðið, Fiskimálaráðið, Heilsumálaráðið, Umhvørvis- og vinnumálaráðið, Vinnuhúsið og Studni hava ongar viðmerkingar til løgtingslógaruppskotið.

Meginfelag Føroyskra Studenta tekur undir við, at eftirlit verður við lestrarvirkni hjá teimum, ið fáa lestrarstuðul frá Studna. MFS heldur tað tó vera umráðandi, at lesandi, ið hava sera avmarkaða fíggjarorku, ikki kunnu enda í eini støðu, har tey fáa høg krøv um afturgjald av studningi. Viðvíkjandi studningi til teirra, ið lesa uttan fyri Norðurlond, heldur felagið, at stuðulsupphæddirnar í framtíðini eiga at verða ásettar við støði í eini fakligari meting eftir einum føstum leisti.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur hesar viðmerkingar:
Tað er longu ábyrgdin hjá tí lesandi og útbúgvingarstovninum at boða frá, um lesandi ikki eru lestrarvirkin. (§ 29 og 29a í kunngerð nr. 107, frá 25. august 2011 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við kunngerð nr. 116 frá 9. juli 2020)

Lesandi á Setrinum hava atgongd til at síggja sína egnu lestrargongd á Studentaportalinum. Tað vil siga, tey kunnu síggja, hvussu nógv ECTS eru staðin í mun til kravið um ikki at vera meira enn eitt ár afturúr lestrinum í mun til ásettu lestrartíðina. Stuðulin steðgar, um lesandi eru meira enn eitt ár afturúr lestrinum. Krøvini verða greiðari sett upp á Studentaportalinum hjá Setrinum frameftir.

Ein setningur er lagdur afturat í viðmerkingunum, sum nágreinar, at við broytingini fevnir stuðulin um allan kostnaðin í Póllandi og um ein størri part av kostnaðinum í øðrum londum.

Heilsuskúli Føroya vísir í ummæli sínum m.a. á, at orðingin í løgtingslógaruppskotinum viðvíkjandi broyting í § 3 í løgtinglógini kundi verið orðað greiðari, soleiðis at áløgd verður skúlanum ein fráboðanarskylda til Studna, um næmingur gevst við lestrinum.

Næmingaráðið í Tekniska skúla í Klaksvík vísir í sínum hoyringarsvari m.a. á, at tað er týdningarmikið, at næmingar fáa at vita, hvat krevst fyri at vera lestrarvirkin, soleiðis at ongar misskiljingar verða.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur hesar viðmerkingar:

Talan er um eina nágreining av, at útbúgvingarstovnurin skal hava eftirlit við, um lesandi lúka treytirnar í seinnu helvt av § 3 í lógini, og hon er serliga ætlað útbúgvingarstovnum, har næmingar/lesandi ikki hava møtiskyldu.

Hesin setningur er lagdur afturat í viðmerkingunum: "Ásetingin er serliga ætlað útbúgvingarstovnum, har lesandi ikki hava møtiskyldu."

UWC Føroyar mælir til ávísar umorðingar og nágreiningar í lógartekstinum.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur hesar viðmerkingar:
Orðið "skúlagjaldsstudning" er broytt til "studning til skúlagjald", tí tað verður brúkt í § 6, stk. 3.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Heimildin at veita studning til altjóða studentapróvtøku varð ikki tikin við í nýggju lógini um gymnasialar miðnámsútbúgvingar frá 15. mai 2012, men hevur støðugt verið praktiserað og fíggjað av játtanini til lestrarstuðul. Hetta er tí ikki ein nýggj útreiðsla hjá Studna.

Kostnaðurin av ætlaðu broytingunum í sambandi við miðnámsskúlanæmingarnar í norðuratlantsflokkinum er treytaður av talinum á næmingum og aldri teirra. Mett verður, at talan í mesta lagi verður um 8-10 næmingar um árið. Kostnaðurin fyri ein næming, sum er undir 18 ár, í eitt ár, er 32.781 kr. Um talan er um 10 næmingar undir 18 ár, er kostnaðurin mettur at verða 327 tús. kr. árliga. Grundarlagið fyri hesi útrokning er: 11x2637 kr. (vistarhaldsstudningur) = 29.007 kr. + bókastuðul á 3.774 kr. pr. næming. Um talan er um útbúgvingarsamstarv, sum er staðsett í Danmark, kemur næmingurin undir stuðulsskipanina hjá SU, tá hann verður 18 ár.

Kostnaðurin av at hækka hægsta mark fyri skúlagjald frá 80.000 kr. til 100.000 kr. er mettur at verða 0,5 mió. kr. um árið.

Talan er sostatt um ein meirkostnað á 800.000 kr.

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Studni umsitur lógina um lestrarstuðul, og mett verður ikki, at økt umsiting verður av broytingunum.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur jaliga ávirkan á lesandi, sum taka útbúgving, sum er skipað sum liður í norðurlendskum samstarvi, og fyri lesandi, sum taka hægri útbúgving uttan fyri Norðurlond

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava týdning fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Mett verður ikki, at lógaruppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, herímillum Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at lógaruppskotið kann elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Ongar ásetingar eru í lógaruppskotinum um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir ella onnur inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki nýggjar skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar Studna at krevja stuðul rindaðan aftur. Henda heimildin hevur ikki áður verið í lógini um lestrarstuðul.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær omanfyrinevndu.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Sosialar avleiðingar	[redacted]	Ja	Ja	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Til nr. 1
§ 3, stk. 3
Ásetingin er nýggj. Álagt verður útbúgvingarstovninum at hava eftirlit við ásetingunum um lestrarvirkni, sum lýstar eru í seinnu helvt av § 3, stk. 1. Ásetingin er serliga ætlað útbúgvingarstovnum, har lesandi ikki hava møtiskyldu. Talan er um, at útbúgvingarstovnurin skal hava eftirlit við, meta um og boða frá, um tann lesandi er lestrarvirkin. Álagt verður útbúgvingarstovninum at boða Studna frá javnan, og endamálið er at tryggja, at lesandi, sum eru sloppin inn á útbúgving, men ikki møta til frálæru og ikki lata inn uppgávur ella fara til prógtøkur, ikki fáa stuðul útgoldnan.

§ 3, stk. 4
Ásetingin er nýggj. Eftir áheitan frá Studna hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið gjørt eina áseting um afturgjalding av stuðli, um treytirnar fyri at fáa stuðul ikki eru loknar. Mett verður, at tørvur er á hesi áseting í sjálvari lógini, soleiðis at ivamál ikki taka seg upp í sambandi við møguliga afturrindan av stuðli.

Til nr. 2
§ 6 b
Ásetingin er nýggj. Talan er um eina líknandi áseting, sum stóð í løgtingslóg um studentaskúlar frá 1995, sum fór úr gildi, tá lógin um gymnasialar miðnámsútbúgvingar kom í gildi í 2013. Við hesi áseting verður skipanin sett í gildi í dagførdum líki. Næmingur, sum gongur 1. árið á 3 ára lestrarfyrireikandi gymnasialari miðnámsútbúgving í Føroyum, kann søkja um upptøku.

§ 6 c
Ásetingin er nýggj. Talan er um, at næmingur, sum tekur lestrarfyrireikandi gymnasiala miðnámsútbúgving, sum er skipað sum liður í norðurlendskum samstarvi, og sum lutvís er staðsett uttan fyri Føroyar, kann verða javnsettur við næming, sum tekur miðnámsútbúgving í Føroyum. Ásetingin gevur næminginum møguleika at fáa vistarhaldsstuðul og bókastuðul, tá hann er undir 18 ár, og um talan er um útbúgvingarsamstarv, sum er staðsett í Danmark, kemur næmingurin undir stuðulsskipanina hjá Statens Udannelsesstøtte, tá hann verður 18 ár.

Til nr. 3
Tøknilig rætting av tilvísingini til løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.

Til nr. 4
§ 13, stk. 1 og 2
Fleiri føroyingar lesa í Póllandi, og av hesum eru fleiri, sum lesa til lækna. Skúlagjaldið er hækkað munandi og er í dag 90.000 kr. Harumframt eru nógv lesandi í Bretlandi, og hjá fleiri teirra er skúlagjaldið eisini hækkað. Við ásetingini verður studningurin til skúlagjald hækkaður til 100.000 kr., umframt at lánið til írestandi skúlagjald verður hækkað til 100.000 kr. Harvið fevnir stuðulin um allan kostnaðin í Póllandi og um ein størri part av kostnaðinum í øðrum londum.

Til nr. 5

Broyting av heiti. Toll- og Skattstova Føroya verður broytt til TAKS.

Til § 2
Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. august 2021, tó kemur § 6 b í gildi dagin eftir, at lógin er kunngjørd. Orsøkin til hetta er, at tørvur er á at fáa dagførdu skipanina virkna sum skjótast.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 3. mars 2021

Jenis av Rana
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Meginfelag Føroyskra Studenta
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Heilsuskúla Føroya
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá næmingaráðnum á Tekniska skúla í Klaksvík
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá UWC Føroyar
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Fiskimálaráðnum
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Studna
Fylgiskjal 10: Hoyringarsvar frá Almannamálaráðnum
Fylgiskjal 11: Hoyringarsvar frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum